## Símin stóra móttøku heima

Tá Símun Samuelsen kom heim mánadagin, eftir dystin móti Ísrael, fekk hann megnar móttøku.

Símun stóð fyri einasta føroyska málinum í dystinum, eitt sera flott mál. Og tá hann kom í túnið heima í Vági, var skreytblað við mynd og heilsum hongt uttanfyri hurðina og eisini føroysk fløgg. Tað var ikki bara tað, at systirin júst var fermd, ið hevði skuld í fløggum og skreyti. Tá Símun kom, flaggaðu øll børnini har leið við fløggum fyri at heiðra føroyska málskjúttanum.

**-do**

## Bermuda og Isle of Wight kappast

Freistin at taka vertsskapin til Oyl í 2011 er runnin, og nú stendur kappingin millum Isle of Wight og Bermuda

Hesum hevur altjóða oyggjaleikanevndin boðað frá í tíðindaskrivi.

Tær báðar oyggjarnar hav nú tríggjar mánaðir at gera eina frágreiðing um, hvussu tey vilja halda leikirnar, og síðani fer altjóða oyggjaleikanevndin at taka støðu til, hvørji tilmæli verða givin.

Endaliga avgerðin verðru tó ikki tikin fyrr enn 8. juli í 2007, meðan leikirnir á Rhodos verða hildnir.

**-mørk**

## Gekk illa hjá Tromsø

Føroysku flogbóltsútisetarnir í Noreg, Bárður B. Mikkelsen og Rúni Weihe, spældu leygardagin útidyst móti Randaberg IL í Stavanger.

Á heimasíðuni hjá Tromsø verður skrivað, at talan var um eitt tað lakasat avrikið hjá liðnum í longri tíð. Tað eydnaðist kortini liðnum at vinna fyrsta settið í dystinum, men síðani gekk bara skeiva vegin. Ein glotti var tó at hóma í triðja settinum, men tá teir hóast 24-22 leiðslu taptu hetta, fóru menn heilt niður við høvdinum, og so gjørdist 3-1 tapið veruleiki.

Komandi vikuskiftið verður talan um dupultumfar hjá Tromsø, tá teir fara á vitjan í Oslo. Har skal nýggi venjarin hjá felagnum - føroyski landsliðsvenjarin, Magnus Aðalsteinsson - fyri fyrstu ferð standa á odda fyri liðnum. Fyrri dysturin í Oslo verður móti Lier, og sunnudagin skulu teir so spæla móti Oslo Volley.

**-mørk**

## Badminton á Kambsdali

Leygardagin varð árliga Mazda-open kappingin í badminton hildin á Kambsdali. Tað er badminton-deildin hjá ÍF, sum skipar fyri hesi kapping, og fevndi hon um allar yngri deildirnar.

Úrslitini av kappingini vórðu hesi:

**U9, gentur**
1 Svanna Poulsen VÍF
2 Heidi Kristoffersen VÍF
3 Sólfríð Olsen VÍF

**U9, dreingir**
1 Áki Egilsnes VÍF
2 Sámal Joensen ÍF
3 Andreas Poulsen ÍF

**U11, gentur**
1 Rannvá D. Carlsen HBF
2 Helena Lamhauge HBF
3 Lilja Luid HBF

**U11, dreingir**
1 Arnhold Kristiansen ÍF
2 Pól Magnus Petersen ÍF
3 Julian Olsen VÍF

**U13, gentur**
1 Birita Poulsen VÍF
2 Súsanna Poulsen VÍF
3 Vár Rógvadóttir VÍF

**U13, dreingir**
1 Ari Ó. Ellingsgaard ÍF
2 Leivur Joensen ÍF
3 Rúni Hentze ÍF

**U15, gentur**
1 Sigrid Dalsgaard HBF
2 Fjóla Luid HBF
3 Gurði Poulsen VÍF

**U15, dreingir**
1 Ari J. Ellingsgaard HBF
2 Andrias Eriksen VÍF
3 Holgar Durhuus VÍF

**U18, gentur**
1 Brynhild D. Carlsen HBF
2 Óluvá Bærentsen ÍF
3 Nicola Graham MBF

**U18, dreingir**
1 Flóvin S. Mikkelsen HBF
2 Hilmar Kass HBF
3 Reidar Luid HBF

# 120 svimjarar í Fuglafirði



*120 svimjarar tóku lut, tá yngstu svimjararnir um vikuskiftið kappaðust í Fuglafirði*

Leygardagin varð árliga FS-stevnan hildin í skúlanum í Fuglafirði.

Kappast varð í bólkunum 1 og 2, og eru hetta svimjarar í aldrinum, 6-10 ár.

Sum skilst, so gekk kappingin sera væl, og eftir at hava kappast allan dagin á tamb, stóð greitt, at tað vóru Ægir og Reki, sum høvdu vunnið flestu heiðursmerkini. Av einstaklingunum vann Óluvá Jacobsen úr Reeka fýra kappingar. Jákup Eysturdal úr Ægir og Turdi Christiansen úr Reka vunnu tríggjar kappingar, meðan Alvi Hjelm, Ægir, Poula Ø. Mohr, Fuglafirði, og Pætur Leo úr Vági vunnu tvær kappingar hvør.

Samlaða heiðursmerkjabýtið í kappingini varð hetta:

| | Felag | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Ægir | 8 | 4 | 3 |
| 1 | Reki | 8 | 4 | 3 |
| 3 | FS | 3 | 7 | 2 |
| 4 | VS | 3 | 5 | 3 |
| 5 | TS | 0 | 2 | 4 |
| 6 | Flot | 0 | 0 | 4 |
| 7 | HS | 0 | 0 | 1 |

# Landsliðið skal fleiri ferðir í eldin

**Í EM undankappingini, sum tað verður farið undir næsta ár, skulu Føroyar spæla 12 ella kanska 14 undankappingardystir**

LANDSLIÐIÐ
Jóannes Hansen

Í kvøld verður lok lagt á HM undankappingina í Europa. Næstu vikurnar verða tvey finaluumfør um síðstu europeisku atgongumerkini til HM, sum í juni næsta ár verður í Týsklandi, og so fara dugnaligu og hepnu landsliðini at fyrireika seg til endaspælið.

Men longu nú verður fokus so smátt sett á næstu EM kappingina, sum ætlast at enda í juni 2008, tá ið endaspælið verður í Sveis og Eysturríki. Fyri stuttum staðfesti UEFA, at tað nú vóru 1000 dagar til fyrsta dystin, og samstundis varð staðfest, at teir í fyrireikingunum vóru eitt ár frammanfyri, um sammett varð við fyrireikingarnar til EM endaspælið, sum á sumri í 2004 var í Portugal.

Lutakastið, um hvussu europeisku fótbóltstjóðirnar skulu bólkast í undankappingini, verður í januar næsta ár. Tað er tó longu greitt, at bólkasamansetingin verður øðrvísi, enn hon hevur verið í seinastu EM og HM undankappingunum, og tað er eisini greitt, at Føroyar skulu spæla fleiri EM undankappingardystir tvey tey næstu árini, enn Føroyar nakrantíð áður hava gjørt.

Í Europa eru 52 fótbóltstjóðir. UEFA hevur gjørt av, at tær 50 – vertirnir eru sjálvskrivaðir luttakararskulu flokkast í sjey undankappingarbólkar. Í seks bólkum verða sjey luttakarar, og í einum bólki verða átta luttakarar. Tað vil við øðrum orðum siga, at luttakararnir í seks bólkum skulu spæla tólv dystir, og at luttakararnir í einum bólki skulu spæla fjúrtan dystir – sjey á útivølli og sjey á heimavølli.

Í endaspælinum, sum verður í Sveis og Eysturríki, fara báðir vertirnir at taka lut, og saman við teimum fara tvey tey bestu í hvørjum bólkinum at stríðast. Tað vil siga, at tað í næstu EM undankappingini ikki verður talan um endaumfar millum tey næstbestu, soleiðis sum tað hevur verið í seinastu HM og EM undankappingunum.